*– Sjálvt um ætlanir eru at gera stórar íløgur í komandi árum, og upphæddirnar á fíggjarlógini til íløgur kunu tykjast avmarkaðar, ber til við neyvari íløguætlan at fáa útint tær ætlanir, sum leingi hava ligið á láni, segði Anfinn Kallsberg í løgmansrøðu síni*
*Mynd: Finnur Justinussen*



†

Okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Martin í Grund**
Søldarfjørður

andaðist í heiminum ólavsøkuaftan, 76 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr heiminum mikudagin kl. 14.00.

**Maria, Mannbjørn, Ólavur, Sámal Petur og Sólborg**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi, abbi, sonur, beiggi, versonur og svágur okkara

**Jens Sigvard Dimon**
Porkeri

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Smyril Line og manningina á Norrønu, og øll sum tóku ímóti okkum, tá ið vit komu heim.

Takk fyri vitjanir, telefonsamrøður, brøv, kransar, blómur og minnisgávur. Ein serstøk tøkk til øll í Porkeri, sum hjálptu til við góðum vilja.

Takk til prestin Jónsvein Bech fyri troystarrík orð í kirkjuni og takk til tykkum mongu, ið fylgdu Jens til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Signa, Agnar, Sakaris og Súsanna**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi tá kæra dóttir, systir og mamma okkara

**Jonhild Mellemgaard Jacobsen**

andaðist og varð jarðað.

Ein tøkk til talarar, sangarar, berarar og gravarar, vitjanir og uppringingar og øllum tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina og sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Louisa, Andre,
Elisabeth, Palli, Armgarð,
Louisa og Juleif**

# Brigsl og skuldsetingar føra ongan veg

**– Tilvildin sleppur at ráða, tá politikarar leggja eftir hvørjum øðrum í eirindaleysum brigsli og skuldsetingum, segði Anfinn Kallsberg í fimtu løgmasrøðu síni**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Anfinn Kallsberg nart í løgmansrøðu síni á ólavsøku við stríðið, sum hevur verið í føroyskum politikki seinastu vikurnar.

Stríðið var loyst beint fyri klokkan 11 ólavsøkudag, tá Tórbjørn Jacobsen tók allar skuldsetingarnar aftur, sum hann setti fram ímóti løgmanni og landsstýrismanninum við fiskivinnumálum í blaðgrein.

– Vit kunnu velja at leita eftir trupulleikum og leggja hvør eftir øðrum í eirindaleysum brigsli og skuldsetingum. Tá er víst, at vit lata ábyrgdina í hendurnar á tilvildini, og er tað tá ikki vit, ið taka avgerðirnar, segði Anfinn Kallsberg í løgmansrøðuni.

– Vit kunnu hinvegin velja at leggja alt brigsl og skuldssetingar til viks og í staðin taka tøk saman, hóast vit eru ósamd politiskt á nógvum økjum. Tá byggja vit land.

### Yvirtøkurnar halda fram

Støðið er lagt undir eini tryggari sjálvstýristilgongd, og samgongan ætlar komandi árini at halda fram við yvirtøkunum, segði løgmaður.

Hann helt, at felagslýsingin hjá honum og danska forsætisráðharranum skapti grundarlag undir eini nøktandi sjálvstýristilgongd, har møguleiki er at taka yvir mál, ið ikki eru nevnd í heimastýrislógini.

Tað, sum nú stendur fyri framman, tá tað ræður um yvirtøkur, er familjurættarmál, havumhvørvi, kortlegging, uppðhavsrættur, vinnulóggáva, tilbúgving, veðurtænasta, vitaverk, uppmerking, fjølmiðlaábyrgdarlóg og arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

– Vit hava longu yvirtikið forsorg og undirvísingarmál, og nú er tað okkara uppgáva at gera skipanir á hesum økjum við grundarlagi í egnum viðurskiftum, segði Anfinn Kallsberg.

Løgmaður fegnaðist um, at vøksturin í búskapinum sær út til at halda fram.

– Síðani mitt í nítiárunum hava vit havt ein árliga realvøkstur í bruttutjóðarúrtøkuni upp á góð 5,5%, og vøksturin sær út til at halda fram. Góða búskapargongdin sæst aftur í øllum samfelagnum, og fólkatalið veksur. Arbeiðsloysi er nú komið niður á 2,7 prosent, segði løgmaður.

Føroyska skuldin til útlandið var við árslok 6,4 milliardir krónur, og ognin er 8,6 milliardir.

– Sjálvt um ætlanir eru at gera stórar íløgur í komandi árum, og upphæddirnar á fíggjarlógini til íløgur kunu tykjast avmarkaðar, ber til við neyvari íløguætlan at fáa útint tær ætlanir, sum leingi hava ligið á láni, helt Anfinn Kallsberg.

### Einskiljing fremjast

Eitt av heitastu politisku málunum í summar hevur verið einskiljingin av almennum fyritøkum. Um hetta segði løgmaður:

– Landsstýrið fer at virka fyri, at greiður skilnaður er millum tað almenna og tað privata. Hetta er besta trygdin fyri, at beinleiðis politisk stýring viðvíkjandi vinnulívinum ikki kemur aftur. Landsstýrið fer nú undir eina tilgongd, sum væntandi fer at halda fram í fleiri ár, har tær ymisku fyritøkurnar, sum landið eigur, verða einskildar.

– Henda tilgongd eigur at verða skipað so, at hon hevur stórt álit millum teir íleggjarar, sum hava áhuga í at ogna sær hesar fyritøkur. Tað er tí umráðandi, at fyritreytirnar fyri einskiljingum eru greiðar, eins og at arbeiðið verður gjørt varliga og gjøgnumskygt og við so stórum politiskum stuðli sum gjørligt, segði Anfinn Kallsberg.

Anfinn Kallsberg segði at enda í røðu síni, at landsstýrið hevði sett sær nógv og høg mál, og tað er tí umráðandi, at raðfestingar verða gjørdar á øllum økjum, soleiðis at landsstýrið nær tey mál, tað setur sær.



# Høgt spæl um landsins leiðslu

**- Tað var eftir mínari meting meira sannlíkt, at Tórbjørn Jacobsen fór at bakka heldur enn at sigla á, sigur Óli Breckman, sum grundað á hesa meting helt tað vera rættast av løgmanni at seta alt upp á spæl í dystinum um skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*

Fólkaflokkurin spældi høgt spæl, tá løgmaður hótti við at leggja frá sær, um ikki Tórbjrøn Jacobsen tók skuldsetingarnar ímóti honum og fiskimálaráðharranum aftur, áðrenn farið varð í kirkju ólavsøkumorgun klokkan 11.

Úrslitið gjørdist sum kunnugt, at Tórbjørn Jacobsen tók hvørt orð í seg aftur, og gjørdi hann ikki tað, hevði løgmaður lagt frá sær uttan at blunka, er formaðurin í tingbólki Fólkafloksins, Óli Breckman, sannførdur um.

Fólkaflokkurin kundi soleiðis havt spælt sær politisku leiðsluna av hondum á sjálvum ólavsøkudegi við at geva Tjóðveldisflokkinum og Tórbirni Jacobsen eitt ultimatum, har alt varð sett upp á spæl.

### Flokkurin ikki handan Tórbjørn

Hvønn veg tað fór at bera, kundi eingin siga við vissu, men taktikkarin hjá Fólkaflokkinum í hesum spæli, Óli Breckman, hevði stórar vónir um, at tað fór at eydnast at fáa Tórbjørn at bakka.

- Eftir at vit høvdu verið á fundi við Tjóðveldisflokkin leygardagin stóð tað mær rættiliga greitt, at Tjóðveldisflokkurin sum heild var ógvuliga sinnaður at fáa málið um skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen út av verðini, sigur Óli Breckman.

Og júst støðan hjá Tjóðveldisflokkinum var trumfurin, sum gjørdi, at Fólkaflokkurin tordi at seta alt upp á spæl.

- Tjóðveldisflokkurin hevur ein sterkan sjálvjustits, sum vit hava sæð í verki fleiri ferðir hesi seinastu fýra árini. Og tá leiðslan í Tjóðveldisflokkinum ikki tyktist at standa aftanfyri Tórbjørn, var tað eftir mínari meting meira sannlíkt at Tórbjørn Jacobsen fór at bakka heldur enn at sigla á, sigur Óli Breckman, sum heldur tað hevði verið stórt spell, um skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen skuldu sett fót fyri samgonguna.

- Hendan samgongan hevur fýra ár eftir at sita, so tað hevði verið ómetaliga býtt, um vit skuldu rent hana á turt longu nú.

### Tórbjørn vann

Óli Breckman er ikki í iva um hvør vann størsta sigurin, tá Tórbjørn Jacobsen át skuldsetingar sínar í seg aftur í seinastu løtu ólavsøkudag. Tað gjørdi Tórbjørn.

- Tað kann vera at Tórbjørn ikki sjálvur hevði tað so gott, eftir at hann varð noyddur at svølgja alt niður í seg aftur, men eg haldi at hann gjørdi rætt, og í roynd og veru var tað hann, sum vann størsta sigurin, heldur Óli Breckman, sum eisini er stak væl nøgdur við úrslitið sæð frá hansara egna plássi í Fólkaflokkinum.

- Tað vísir seg at í slíkum málum er effektivasta loysnin at leggja veruligt trýst á fyri at loysa málið, sigur Óli Breckman, formaður í tingbólki Fólkafloksins.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, segði við útvarpið, eftir at Tórbjørn Jacobsen í einum brævi ólavsøkumorgun hevði tikið skuldsetingar sínar aftur, at nú var tann sakin úti av verðini.

Men tað skrivaða orðið kann sum kunnugt ikki tigast, og bert tíðin fer at vísa, um løgmaður fær rætt í at sakin er úti av verðini, ella um skuldsetingarnar verða hangandi í leysari luft, nú eingin longur stendur aftan fyri tær.

# Rátt og gott

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*

Tann bleyti oyravinarligi poppurin varð kroystur í bakgrundina til frama fyri rættiliga ráum og ópoleraðum tónleiki, tá ólavsøkukonsertin vanabundin sendi ljóðbylgjur úr Kommunuskúlagarðinum um alla Havnina leygarkvøldið og sunnunáttina.

Einir 3000 áhoyrarar høvdu keypt atgongumerki frá fyriskiparanum FUT, og hesi fingu eina rættiliga umfatandi mynd av tí, sum hendir á tí alternativa og á tí meira tyngra endanum av føroyska tónleikapallinum.



*Eftir at hava ligið í dvala í nógv ár, vóru Hatespeech aftur á palli á Ólavsøkukonsertini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÚTSØLAN

Nógv góð tilboð uppá klæðir og skógvar

byrjar hósdagin 1. august

mikudagin 31. juli er stongt

P/F THOMAS DAM
Ítróttur · N. Finsensgøta 5 · Postsmoga 268
FO-110 Tórshavn · Tlf. 355300 · Fax 319980 · e-mail: sportthd@post.olivant.fo